# Skúlasamstarv í 40 ár

**Týsdagin 3. apríl eru 40 ár liðin, síðan Miðvágs Sandavágs Skúli á Giljanesi varð vígdur. Dagurin verður markeraður á skúlanum**

MERKISDAGUR
*Edvard Joensen*



*2. páskadag í 1961 varð nýggi Miðvágs Sandavágs Skúli, sum bygdur varð á Giljanesi miðskeiðis millum báðar bygdirnar, vígdur*
*Mynd: Edvard Joensen*

Týsdagin verður Miðvágs Sandavágs Skúli 40 ár. Skúlin á Giljanesi varð vígdur annan páskadag 1961.

Upprunaliga byrjaði skúlasamstarvið millum hesar báðar kommunurnar longu í 1955, tá fyrsti fundurin um skúlasamstarv varð hildin. Síðan varð arbeitt miðvíst fram í móti at byggja eins stóran felagsskúla, sum lagdur varð á Giljanesi, miðskeiðis millum báðar bygdirnar. Skúlin varð vígdur annan páskadag - triðja apríl - 1961 av Jákupi Joensen, varabiskupi.

Sigurd Petersen, sum tá var fyrstilærari í Sandavági, gjørdist fyrsti skúlastjóri, og røkti hann hetta starv, til hann legði frá sær fyri aldur í 1992, tá Emmy Joensen tók við.

## Plásstrot

Tað var í grundini plássrot sum gjørdi, at nýggi felagsskúlin varð bygdur. Í báðum bygdunum var gamal skúli, har næmingarnri vóru býttir upp í fimm flokkar. Og barnatalið vaks so mikið, at byggjast mátti út ella helst av nýggjum. Tí varð gingið saman um at gera ein felagsskúla.

Hetta samstarv var slóðbrótandi í føroyskari skúlasøgu, tí hetta var fyrsti felagsskúlin í landinum. Seinni eru komnir felagsskúlar á Sandi og Oyrarbakka, men Miðvágs Sandavágs Skúli er tann einasti, sum hevur næmingar frá fyrsta til tíggjunda flokk. Tað vóru tilsaman 10 lærarar við skúlan tá. Skúlastjórin og varaskúlastjórin íroknaðir.

Fyrsti preliminerflokkurin byrjaði í gamla bygdarskúlanum í 1959, og tók prógv á Giljanesi í 1962. Fyrstu árini komu eisini næmingar úr Sørvágs Skúla í triðja P. á Giljanesi og tóku prógv haðani. Seinni er tann skipanin so broytt um realskúla til framhaldsdeild við áttanda, níggjuna og tíggjunda flokki.

Men tað var so skjótt, at hesin nýggi skúlin var ov trongur, greiðir heimildarmaður okkara, Sigurd Petersen, frá. Og neyðugt varð aftur at flyta yngstu flokkarnar í gomlu bygdarskúlarnar, so pláss fekst fyri serstovum í nýggja skúlanum.

Fyri at økja um valmøguleikarnar í framhaldsdeildini varð ávíst samstarv uttan fyri kommunumørkini fingið í lag, soleiðis at næmingar í framhaldsdeildunum í Vestmannaa og Sørvági komu á Giljanes ein dag um vikuna at hava vallærugreinir saman við næmingum úr Miðvágs Sandavágs Skúla. Hendan skipanin stóð víð nøkur ár, men gjørdist ov tung og varð tí tikin av aftur.

Síðan svimjihøll varð bygd í Sørvági, hevur eisini verið samstarvað tann vegin, soleiðis at næmingar úr fjórða til sjeynda flokk í Miðvágs Sandavágs Skúla hava svomið í Sørvági.

## Nýggjan skúla

Eitt tað fremsta ynskið hjá verandi skúlastjóranum, Emmy Joensen, er at fá nýggjan skúla til yngstu flokkarnar. Ella í øðrum lagi fáa bygt upp í verandi skúla á Giljanesi, soleiðis at teir yngstu næmingarnir kortini fáa verið fyri seg sjálvar.

Í dag er skúlagongdin á trimum støðum. Tilsamans eru 265 næmingar í Miðvágs Sandavágs Skúla. 56 teirra ganga í fyrsta og øðrum flokki í Gamla Skúla í Sandavági. Aðrir 56 ganga í triðja og fjórða flokki Bygdarskúlanum í Miðvági, sum bygdur varð í 1985. Meðan restin, eldru flokkarnir, ganga í skúlanum á Giljanesi. Tað starvast í dag 25 lærarar við Miðvágs Sandavágs Skúla.

Í 1983 varð bygt upp í skúlan á Giljanesi. Tá komu fleiri serstovur, stór forhøll, sum bindur báðar bygningarnar saman, og eisini ítróttarhøllin. Og hon hevur havt rættiliga stóran týdning fyri trivnaðin hjá ungdóminum í oynni, eru bæði fyrrverandi og núverandi skúlastjórarnir samd um.

– Men tað er ikki nóg gott, sigur Emmy Joensen. Tað krevur nógva tíð og orku at flyta næmingarnar ímillum soleiðis, tí onkran dag eru eisini teir yngru næmingarnir á Giljanesi.

Hon kundið hugsað sær, at ein nýggjur barnaskúli varð bygdur á Giljanesi, har smærru børnini fingu verið í skúlagarði fyri seg, men kortini soleiðis, at høli og útgerð vóru løtt at komið at. Í øðrum lagi má byggjast upp í gamla skúlan, sigur skjúlastjórin.

Emmy Joensen, skúlastjóri, metir, at tað verður upp aftur meira neyðugt um stutta tí at fáa bygt skúlan út. Tí útlit eru fyri, at fólkatalið, og harvið eisini barnatali, í kommunum báðum fer at økjast, nú fasta sambandið undir Vestmannasundi verður veruleiki.

– Tað er rættiliga nógv, sum bendir tann vegin, sigur hon.

Sjálvur 40 ára dagurin verður hildin við einum tiltaki á skúlanum fyri næmingunum, sigur Emmy Joensen, skúlastjóri, sum leggur aftrat, at sjálvandi eru foreldur og onnur áhugað eisini vælkomin á skúlan hendan dagin.





*Í 1961 fluttu næmingarnir úr gomlu bygdarskúlunum í Miðvági, v.m., og Sandavági, h.m., í nýbygdan felagsskúla á Giljanesi. Í dag eru 1. og 2. flokkur aftur í Gamla Skúla í Sandavági, meðan 3. og 4. flokkur ganga í nýggja bygdarskúlanum í Miðvági*
*Mynd: Edvard Joensen*

# ítróttur

Nr. 64 • leygardagur • 31. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Julian og Kurt á veg til Leeds

**Í komandi viku fyrireikar Sogndal seg í Onglandi til kappingarárið, har tað fer at snúgva seg um at varðveita plássið í bestu deildini**

At vera fulltíðar yrkisfótbóltsspælari er ivaleyst dreymurin hjá mongum pilti, sum er bitin av fótbóltinum og fótbóltsspælinum. At liva av tí, sum tú tímir allar best av øllum ljóðar lokkandi, og so eru tað fleiri, ið vinna nógvar pengar av fótbóltinum.

Men tað er eisini troyttandi at vera yrkisspælari, og teir flestu, sum liva av fótbóltinum, vildu ivaleyst skriva undir uppá, at medaljan hevur eina aðra síðu enn hana, sum tað sást og hoyrist um.

Vit hava ikki hoyrt frá Juliani Johnsson og Kurt Mørkøre, síðani teir hósdagin komu aftur til Sogndal. Tá høvdu teir verið burturi í landsliðsørindum í átta dagar. Men teir fáa ikki høvi at liggja á sofuni og hvíla eftir nógvu ferðingina og stóra stríðið í fyrst Luksemburg og síðani Moskva.

Í morgin fer Sogndal hópurin til Haugesund, har teir skulu spæla venjingardyst. Og hagani halda teir leiðina fram til Onglands. Teir fara við ferju úr Bergen og til Newcastle, og hagani fara teir til Leeds, har Sogndal skal venja frá týsdegnum og restina av vikuni.

Bara ein dystur er á skránni, og hann er ímóti einum øðrum norskum liði. Hósdagin á middegi skulu Sogndal og Tromsø spæla venjingardyst. Julian Johnsson, Kurt Mørkøre og liðfelagarnir koma aftur til Sogndal annan sunnudag. Har skulu teir leggja síðstu hond á fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Sjøtul verður settur á landskappingina um fjúrtan dagar. At setningurin í fyrsta umfari verður at varðveita sessin í bestu deildini er einki at ivast í.

Í fjølmiðlunum í Sogndal verður tosað og skrivað um, at kanska skulu onkrir nýggir spælarar koma til felagið, men enn er hetta ikki vorðið meiri ítøkiligt.

## Altjóða dámur

1. liðs hópurin hjá Sogndal fer til Leeds at venja. Men tað verða eisini stundir at síggja góðan fótbólt. Mikukvøldið verður stórdystur á Ellen Road í Leeds. Heimaliðið, sum hevur staðið seg ógvuliga væl í europeisku meistarakappingini í ár, fær vitjan av Deportivo La Carounia, og Sogndal ferðaliðið skal fylgja við, hvussu tað fer at gangast hjá norðmanninum Eirik Bakke og hansara liðfeløgum. Komandi leygardag fær Leeds í eingilsku landskappingini vitjan av Southampton. Talan verður um fyrsta útidystin hjá teimum, eftir at Glenn Hoddle er stungin av og er farin til Tothenham, sum hann spældi fyri í so nógv ár. Kurt Mørkøre, Julian Johnsson og hinir í Sogndal fara at fylgja við í, hvussu dysturin fer at spæla av.

Meðan landsliðið var í Luksemburg, vistu okkara menn har niðri at siga frá Juliani Johnsson, at umboð fyri Bradford vóru og hugdu at dystinum. Julian hevði frammanundan verið á vitjan í Bradford. Føroysku pressuumboðini í Luksemburg mettu, at avrikið hjá Juliani var eitt tað mest sannførandi í 2–0 sigrinum fyri einari viku síðani.

Síðani tá hava vit einki hoyrt um, hvussu tað er við áhuganum hjá Bradford. Vit kunnu bara staðfesta, at Julian og Kurt eru á veg til Onglands í venjingarlegu, og at ætlanirnar enn eru, at teir báðir skulu hjálpa til, tá Sogndal fer at stríðast fyri at varðveita plássið í bestu norsku deildini.

**jh**




*Julian, Kurt og Sogndal eru á veg til Leeds*

# Herfølge spælir fyri lívinum

**FCK áskoðararnir vilja ikki fara í Brøndby, og felagið hjá Óla Johannesen skal vinna fyri at tað framvegis skal verða spennandi**

Stórdysturin í Danmark hetta vikuskiftið er tann í Brøndby ímillum Brøndby og FCK. Sæð við føroyskum eygum fór nakað av glansinum burtur, tá tað varð greitt, at Todi Jónsson ikki verður førur fyri at spæla.

Sambært donsku fjølmiðlunum tykist áhugin millum FCK áskoðararnar at fara í Brøndby ikki at vera so stórur, sum tað kundi hugsast. Tey 2200 atgongumerkini, sum FCK stuðlarnir høvdu fingið, vórðu ikki skrødd burtur, soleiðis sum tað frammanundan varð roknað við. FCK fólkini siga, at teimum hóvar einki serligt at fara á Brøndby stadion, har tað er lagt upp til stórt royksjov.

## Lagnudystur

Herfølge fer í morgin í Gladsaxe í Keypmannahavn. Talan er um sannan lagnudyst ímóti AB. Á AB liðnum eru tríggir landsliðsspælarar – fyrrverandi Herfølge maðurin Steven Lustü, Jan Michaelsen og Brian Steen Nielsen. Felags fyri teir allar er, at teir vóru á beinkinum í málleysa dystinum ímóti Kekkia.

Herfølge eigur ein landsliðsmann. Tað er Jákup Mikkelsen. Føroyski landsliðsmálverjin stóð seg avbera væl í landsdystunum, og tað er einki at ivast í, at sjálvsálitið hevur fingið eina tonn rætta vegin. Illa sperda Herfølge liðið lítur nógv á málverjan í morgin.

Liðið hjá Johan B. Hansen, OB, fær vitjan av Lyngby. JohanB. Hansen hevur ikki verið á liðnum hjá OB síðstu vikurnar, og tað mundi kennast sum eitt stórt vónbrot, tá Allan Simonsen undan dystinum í Moskva gjørdi av, at Pól Thorsteinsson skuldi fáa miðverjuplássið, sum Johan B. Hansen hevði røkt í Luksemburg.

## Óli í miðverjuni

Í næstbestu deildini í Danmark var eitt umfar á skránni síðsta vikuskifti. Meðan Óli Johannesen var í luftini á veg úr Luksemburg og til Moskva stríddust liðfelagarnir úr Hvidovre í Esbjerg. Teir megnaðu 1–1, og tað varð mett at vera eitt gott úrslit, tí Esbjerg telist ímillum oddaliðini í næstbestu deildini.

Í morgin fær Hvidovre vitjan av Brønshøj. Talan er um eitt botnlið, men tá teir eru grannar hjá Hvidovre, mugu Óli og teir stríðast fyri søkini.

Hóast hann ikki hevur vant saman við nýggju liðfeløgunum í hálva aðru viku, og tykist eingin ivi vera um, at Óli Johannesen verður aftasti maður á Hvidovre liðnum. Frank Skytte, fyrrverandi TB venjarin, hevur stórt álit á 50 landsdystar manninum, sum mikukvøldið var liðformaður á landsliðnum.

Í Hvidovre vilja teir fegnir vera ímillum liðini í ovaru hálvu. Um nakar hugsningur skal vera um tað, so skulu teir vinna heimadystin í morgin.

**jh**